# Sigrun hevur framsýning



*Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen sýnir í hesum døgum fram listarverk hjá sær í Listaskálanum í Havn. Mynd: Jens Kr. Vang*

Eyðun Klakstein

Í dag klokkan 16.00 letur um listaframsýning í Listaskálanum í Havn.

Tað er Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, sum fer at sýna fram verk hjá sær, og hetta er fyrsta ferðin, at hon hevur serframsýning í Listaskálanum.

Sigrun er fødd á Eiði, ho er útbúgvin á Tekniskúlanum hjá Askou Jensen á Glyptotekinum í Keypmannahavn. Hon hevur somuleiðis gingið á málara- og grafikkskúlanum á Kunstakademinum í Keypmannhavn.

Síðani miðskeiðis í sjeytiárunum hevur Sigrun sýnt fram á Eiði og í Havn, og hon hevur millum annað verið við á Ólavsøkuframsýningum og Várframsýningum.

Hon hevur eisini sýnt fram í Danmark og Svøríki.

Tíðin í Eysturgrønlandi frá 1992 til 1998 hevur givið henni stóran listarligan íblástur, og í fjør hevði hon framsýning í Grønlandi.

Framsýningin er til 24. apríl.






# Súni Vinther hongt búnan í skápi

*Hósdagurin var seinasti arbeiðsdagur hjá Súna Vitnher, støðleiðara í Havn. Hann fer frá fyri aldur um mánaðarskifti apríl-mei, men hann hevur verið í uniforminum fyri seinastu ferð*

Sveinur Tróndarson

Eftir at hava verið løgreglumaður í meiri enn 37 ár, hevur Suni Vinther nú latið seg úr búnanum fyri seinastu ferð. Hósdagurin var hansara seinasti arbeiðsdagur, so hóast hann ikki gevst hjá løgregluni fyrr enn næsta mánaðarskifti, so verður hann ikki aftur at síggja í búna.

– Eg fari ongantíð í hann aftur, sigur Suni Vinther.

Men tað er ikki tí, at hann hevur verið ónøgdur við arbeiði, men tá ein er givin, ja, so er ein givin.

### Ein long og gíð søga

Tá Suni Vinther, um ársskiftið 1963 fór til arbeiðis úti í Kastrup, var hann - og tveir aðrir føroyingar - tann fyrsti, sum var útbúgvin løgreglumaður eftir tí skipan, sum koyrir enn tann dag í dag.

– Vit byrjaðu á Politiskúlanum og tá tað var liðugt, vórðu vit sendir til arbeiðis í Kastrup. Har var eg so í gott og væl eitt ár, til eg í juni 1964 varð fluttur heim til Føroya. Burtursæð frá 1969, tá eg tók kriminalútbúgvingina í Danmark, so havi eg verið her síðani, sigur Suni Vinther.

Og hann letur sera væl at. Tað eru tey góðu minnini, sum ganga aftur, og hóast tað eru seks ferðir fleiri løgreglumenn nú, so heldur Suni ikki, at tað er so nógv øðrvísi, enn tað var tá.

– Av tí at tað eru fleiri løgreglumenn, so verður gingið vaktir, og tí hevur tú serliga nógv saman við teimum, sum tú hevur vakt saman við, men tað er einki óvanligt í tí. Samanhaldið hevur kortini verið sera gott tvørtur um vaktirnar, og í so máta er tað einki øðrvísi enn tá vit vóru 10, sigur Suni.

Ein broyting er kortini, at í »gomlum« døgum, var tað ikki óvanligt, at ein løgreglumaður fór út til eitthvørt einsamallur, og tí fekk hann eitt tætt samstarv við sjúkrabilførararnar, sum ofta eisini komu einsamallir.

– Tí kanst tú siga, at vit tá arbeiddu meira saman tvørtur um fakmørkini enn vit gera í dag, men tað hevði eisini verið óhugsandi at farið út einsamallur í dag.

### Uppbygdi kriminaldeildin

Í 1969 varð heitt á Suna um at átaka sær at uppbyggja kriminaldeildina, sum skuldi setast á stovn í Føroyum. Eingin útbúgvin løgreglumaður var í Føryoum og tí mátti Suni til Danmarkar har hann tók eina rúgvu av kriminalskeiðum, samstundis, sum hann arbeiddi á kriminaldeildini í Næstved.

– Eg haldi, eg tók øll skeiðini, sum vóru á kriminaløkinum tá, men tað er tíverri komið so nógv afturat síðani. Tá var t. d. einki, sum kallaðist edv-kriminalitetur, so..., sigur Suni og smáflennur.

Heimafturkomin starvaðist hann so sum leiðari á kriminaldeildini í 15-18 ár - hann minnist ikki sjálvur - og tey munnu ikki vera so fá, sum serliga minnast Suna sum kriminalpolitist.

Í 1988 varð hann so útnevndur støðleiðari í Havn. Táverandi støðleiðari, Niclas Akraberg Poulsen, gjørdist politiinspektørur og Suni fekk hansara starv. Hesum starvi hevur hann so sitið í til hósdagin tá hann hevði seinasta aktiva starvsdag. Komandi mánaðin gongur so við at hava summarfrí og tá 1. mai kemur er Suni Vinther fyrrverandi løgreglumaður.

### Suni og drotningin

Suni Vinther gevst hjá løgregluni nú hann gerst 60 ára gamal. Henda møguleika hava løgreglumenn, men teir kunnu arbeiða til teir eru 63. Kortini valdi hann hesa loysnina, og í staðin fer hann at stákast við okkurt heima.

Men hann fer hvørki at ansa seyði ella rógva út, tí hann hevur hvørki trøð, seyð ella bát.

– Onnur í familjuni hava havt størri hug til tað enn eg, og tí helt eg, at tey skuldu sleppa framat. Men eg fari nokk ístaðin at brúka meiri tíð upp á Reyða Kross, sigur Suni Vinther.

*Kona tín sigur, at nú sleppur tú, at gera tað, sum hevur ligið á láni í 37 ár Hvat sigur tú til tað?*

– Oyjøssus! Jú, har havi eg ríkiligt at tríva í eisini, so eg skal nokk fáa tíðina at ganga, sigur Suni Vinther, sum fyllur 60 ár tann 16. apríl. Tann dagin gloymir hann neyvan, tí hann er javngamal við Margrethu drotning, so var hann heima, so fekk hann nokk at hoyra, at hon hevur føðingardag.

Men tað verður hann ikki, tí hann og familjan fara út at ferðast tá tann stóri dagurin upprennur.

Sosialurin takkar Suna fyri samstarvið, meðan hann hevur verið løgreglumaður og ynskir honum alt tað besta nú eftirlønaraldurin byrjar. Sjálvur óttast hann kortini ikki fyri tí.

– Men munnu ikki timburmenninir fara at koma um einar tveir mánaðir, spyr hann...



# Undirtøka fyri at landsbankalógin verður broytt

*Nevndin í Føroya Banka fanst á aðalfundinum at broytingunum, sum eru á veg í lógini um landsbankan, men alt bendir á, at løgtingið samtykkir broytingarnar í lógini um landsbankan*



Sveinur Tróndarson

Í blaðnum í gjár, endurgóvu vit brot úr ársfrágreiðingini hjá nevndini fyri Føroya Banka, sum m. a. fanst at lógarbroytingini, sum er á veg í lógini fyri Landsbanka Føroya.

Nevndin vísti á, at tað í løtuni sær út til, at landsbankin fær eina serstøðu, við tað at hann kann gerast banki hjá kommunum og øðrum almennum stovnum og hetta er at gera seg inn á kappingarøkið hjá føroysku peningastovnunum við lóg.

### Tekur frá hinum

Tá Karsten Hansen legði uppskotið fyri tingið, gjørdu stjórarnir í føroysku peningastovnunum skjótt av og sendu fíggjarnevndini bræv, har teir gera vart við sína støðu. M. a. vísa stjórarnir á, at landsbankin við verandi valutastøðu Føroya ikki hevur møguleika til at liva upp til endamálsorðingina um at arbeiða fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í Føroyum, av teirri orsøk, at Føroyar ikki hava sín egna gjaldoyra.

Tí ber m. a. ikki til hjá landsbankanum at stýra gjaldførinum sum er, tí føroysku peningastovnarnir sjálvir kunnu lána gjaldføri uttanlands.

Stjórarnir gera vart við, at landsbankin, um lógin verður broytt, ger seg inn á teirra arbeiðsøki, ístaðin fyri at lata teirra peningastovnar, sum hava útbúgvið fólk, røkja uppgávuna við gjaldførinum fyri landsbankan.

Teir siga, at landsbankin higartil hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at betra um búskaparligu tilvitanina í Føroyum og tað eigur hann at halda seg til. Hann eigur at hava yvirskipaða eftirlitið við gjaldførinum og ikki sjálvur umsita gjaldførið. Landsbankin eigur at útlisitera uppgávuna, sum ikki nýtist merkja, at alt verður sett í føroyskar peningastovnar.

### Hava gloymt kreppuna

Landsbankin hevur sent fíggjarnevndini svar til brævið frá peningastovnunum. Har verður víst á, at tað tykist, sum hava føroysku peningastovnarnir hava misskilt týdningin av kreppuni í 90 árunum og arbeiðinum, sum var gjørt í kapitalmarknaðarnevndini.

M. a. var ov nógv fíggjarlig bond vóru millum myndugleikarnar og peningastovnarnar við veðhaldum, innlánum og útlánum.

Ein av lærunum var, at landskassin eigur at læna við lánsbrøvum á marknaðinum og ikki beinleiðis úr peningastovnunum, verður eitt nú sagt í skrivinum frá landsbankanum.

Landsbankin gevur peningastovnunum rætt í, at tað ikki ber so væl til at reka gjaldoyrapolitikk tá landið ikki hevur sjálvstøðugt gjaldoyra, men tí hevur tað størri týdning, at myndugleikarnir umsita almenna fíggjarogn í eini heild og við umhugsni fyri framtíðini.

Vandi er fyri, at góðu tíðirnar fremja útlánshugin, sum aftur setur meira ferð á vinnuna. Landsbankin heldur ikki at alment gjaldføri eigur at vera brúkt til at slíkan útlánsvøkstur, men heldur eigur at verða goymt til tíðirnar gerast verri.

– Best egnaði stovnur at standa fyri heildarumsitingini av almennari fíggjarogn er landsbankin. Uppgávan er ein náttúrlig monopoluppgáva, tí annars fæst ikki ein heildarumsiting, sigur landsbankin í skrivinum.

### Taka eftir øllum at døma undir

Hóast mótmæli frá peningastovnunum, so bendir alt á, at uppskotið hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum fær undirtøku í fíggjarnevndini.

Nevndin hevur ikki latið tinginum álit, men ein kanning, sum Sosialurin hevur gjørt vísir, at tað eftir øllum at døma er undirtøka fyri uppskotinum hjá landsstýrismanninum.

Verður gomul tíð havt í huga, so kann tað kanska tykjast løgið, at Fólkaflokkurin tekur undir við málinum, tí hann hevur ikki verið serliga heitur fortalari fyri landsbankanum. Sum skilst tekur Fólkaflokkurin í fíggjarnevndini undir við málinum, og tá bæði Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eisini taka undir, so er meiriluti.

Men hann tykist gerast størri, tí Javnaðarflokkurin í fíggjarnevndini tekur eisini undir við uppskotinum. Vilhelm Johannesen, úr Javnaðarflokkinum, sigur, at teir taka undir við uppskotinum, tí teir halda at tað er rættast, at landsbankin umsitur almenna gjaldføri.

– Uttan at leggja nakran undir nakað, so vístu 80 árini, at føroysku peningastovnarnir ikki dugdu at fara um gjaldføri og m. a. tí endaðu vit í eini svárari kreppu. Vit vilja ikki hava, at tað skal henda einaferð enn og tí halda vit, at landsbankin skal umsita gjaldføri landskassans, so tað ikki verður oyst út í samfelagið, sigur Vilhelm.

Bjarni Djurholm, formaður í fíggjarnevndini váttar fyri Sosialinum, at álitið er komið undir land og hann væntar, at málið verður avgreitt mánadagin. Hóast hann ikki vil siga, at nevndin tekur undir við uppskotinum, so vil hann kortini siga, at tað er nógv, sum bendir á, at tað verður samtykt næstan sum tað var framlagt.

## Marknaðardagur í Sjónleikarhúsinum

Havnar Sjónleikarfelag skipar í dag fyri marknaðardegi í Sjónleikarhúsinum. Stórur loppumarknaður verður, har møguleiki er at onga sær ymsar lutir. Millum annað er ein rúgva av bókum bíliga til sølu. Til børnini veður fiskibrunnur og eisini verður tombola við ymiskum heimabakstri. Kaffi og te verður at fáa. Tiltakið er í dag frá klokkan 10 til 17.

# Faroe Brass til Onglands

*Faroe Brass er boðið til meistaraskap í Ongland og sóknast nú eftir sponsorum*

Dagfinn Olsen

Føroyska tjóðhornorkestrið, Faroe Brass, hevur fingið serliga innbjóðan til European Championships, sum verða 28. apríl í Birmingham í Onglandi.

Faroe Brass er sett saman av 8 lokalum føroyskum hornorkestrum.

Kappingin í Birmingham er heimsins størsta og er besti og mest spennandi møguleikin hjá føroyskum blásarum í áravís.

Flogfar léttir sær á úr Vágum tann 26. apríl og tey, ið hava áhuga, kunnu venda sær til Faroe Travel. Ferðalagið er aftur í Føroyum 30. apríl.

Í løtuni verður leitað eftir sponsorum til ferðina og verður heitt á fólk og feløg um at hjálpa til at gera ferðina til eina væleydnaða tónleikaferð.

# Fundur um KT

Mánakvøldið klokkan 20 skipar Ungmannafelagið Samband fyri almennum fundi um KT í Føroyum á Runavíkar Sjómansheimi.

Olav Enomoto fer at greiða frá um KT í praksis, og eisini luttaka løgtingslimirnir Edmund Joensen og Alfred Olsen.

Umframt at vera virkin limur í Ungmannafelagnum Samband er Olav Enomoto útbúgvin datamatikari og starvast dagliga hjá føroyskari teldufyritøku.

**ek**

